# Viðtøkur fyri Ramsar nevndina fyri Skúvoy

**Endamálið við Ramsar nevndini er at gera Ramsar ætlan fyri Skúvoy, sum m.a. skal vísa á møgulig tiltøk, átøk og mannagongdir, sum skulu til, fyri at tryggja, at náttúruvirði í Skúvoy, serliga fuglur og vistskipan teirra, verða varðveitt eftir regluni um skynsama nýtslu (wise-use).**

Hetta verður gjørt í tøttum samstarvi við allar áhugapartar, við serligum denti á kommunu, borgarar, felagsskapir o.o. í Skúvoy.

**Ramsar nevndin í Skúvoy hevur hesar føstu limir:**

- Umhvørvisstovan
- Havstovan
- Náttúrugripasavnið
- Skúvoyar kommuna
- Umboð fyri hagastýrini í Skúvoy
- Kunningarstovan á Sandi

Aðrir áhugapartar verða bodnir til fundar eftir tørvi. Nevndin skipar fyri almennum fundum tá tørvur er á tí.

Fiskimálaráðið og Mentamálaráðið fylgja arbeiðinum, og fáa avrit av fundarfrásøgnum.

**Ítøkilig mál**

1) At eyðmerkja møguligar hóttanir ímóti fuglalívi o.ø., og vísa á verjutiltøk, sum skulu setast í verk. Serligur dentur verður lagdur á at verja og tryggja lomviga og annan fugl í Skúvoy.
2) At gera “Ramsar ætlan fyri Skúvoy” (fyrisitingarætlan), sum ætlandi skal verða liðug í 2015.
3) At viðgera spurningar viðkomandi fyri fuglateljing í Skúvoy sum Ramsar øki.

**Mannagongdir**

- Nevndin fer at hittast javnan í sambandi við, at Ramsar ætlanin fyri Skúvoy verður gjørd, á leið 1 til 2 ferð um mánaðin.
- Fram til, at Ramsar ætlanin er liðug, leiðir Umhvørvisstovan arbeiðið og virkar sum formaður og skrivari í nevndini.
- Á leið eina viku áðrenn hvønn fund sendir Umhvørvisstovan limunum uppskot til fundarskrá og í seinasta lagi 3 dagar áðrenn fundin fáa limir møgulig fundarskjøl.
- Uppskot til fundarfrásøgn verður send limunum 1-2 vikur eftir fundin.
- Nevndarlimir, sum ikki eru í almennum starvi, fáa fundarsamsýning og endurgoldið ferðaútreiðslur sambært almennum reglum.

Viðtøkurnar vórðu samtykt á fundi í Ramsar nevndini fyri Skúvoy tann 11.05.15.